# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*



# NÓGVIR BRÚKTIR BILAR SELDIR




*Føroya størsti brúktabilamarknaður var á Skálatrøð leygardagin 1. mai*



*Fyrireikararnir av tiltakinum f.v.: Jannie Dam Jacobsen, Jógvan Elias Jacobsen og Regin Joensen frá Róðrarfelagnum Knørri*



*Øssur Johannesen og Fróði Clementsen frá Bilasøluni saman við Birgiri og Frits Dam Jacobsen frá Norðbil*



*Feðgarnir Eivind og Sámal av Reyni og Heðin Hansen frá Reyni Service og Tróndur Sigurðsson frá P/F Wenzel*

Leygardagin 1. mai var Føroya størsti brúktabilamarknaður á Skálatrøð í Havn, har fleiri av bilasølunum sýndu fram og seldu brúktar bilar á einum felags marknaðardegi.

Tað var Róðrarfelagið Knørrur, sum skipaði fyri tiltakinum í samstarvi við bilasølurnar, ið stóðu fyri sjálvari framsýningini og søluni av bilunum.

Í sambandi við bilamarknaðin varð eitt stórt tjald sett upp, har fólk kundu koma inn at hugna sær og práta saman yvir ein kaffimunn.

Ein av fyrireikarunum, Jannie Dam Jacobsen frá Róðrarfelagnum Knørri, sigur, at fólk tóku væl undir við tiltakinum, og nógvir bilar vórðu seldir. Hon vónar at hetta verður eitt afturvendandi tiltak. Umboð fyri tær ymisku bilasølurnar lótu eisini væl at tiltakinum.

---

# Skoda - kvikasti politibilur í Danmark




## Við eini toppferð upp á 250 km/t er Skoda Superb 3.6 FSI kvikasti politibilur í Danmark. Bilurin koyrir frá 0-100 km/t upp á 6,5 sekund

Kvikastu politibilarnir á donsku vegunum eru Skoda. Talan er um Skoda Superb 3.6 FSI 4x4 við DSG-girskifti og 260 hk. Bilurin koyrir frá 0-100 km/t upp á 6,5 sekund og toppferðin er 250 km/t.

Superb 3.6 hevur snúningsmoment upp á 350 Nm við 2.500 snún/min.

So um ein koyrir í Danmark, og ein Skoda politibilur sæst í bakkspeglinum, eru ikki nógvir møguleikar fyri at koyra undan politinum.